# TILTØK

**Gudstænastur Hvítusunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Sonja Klein
***Kaldbak:*** kl. 12, Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen
***Kirkjubøur:*** kl. 12.30 Bergur D. Joensen
***Norðradalur:*** kl. 14 Heri Joensen
***Sandavágur:*** kl. 11 altarg., David Johannesen
***Bøur:*** kl. 11, altarg., Inga Poulsen Dam
***Hósvík:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Kollafjørður:*** kl. 11, Mogens Tilsted Christensen. ***Í Kvívíkar kirkju gongur talvan fyri stiftsnevndina hjá bíbliufelagnum.***
***Í Kollafjarðar kirkju gongur talan fyri sunnudagsskúlan í Kollafirði***
***Eiði:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 Messa Emil Olsen
***Gjógv:*** kl. 17, Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 18.30 Emil Olsen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11, Jóannis Fonsdal
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð. ***Talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.***
***Skála:*** kl. 11 Familjugudstænasta, barnakórið, Jógvan Fríðriksson
***Oyndarfjørður:*** kl. 18, Jógvan Fríðriksson
***Eiði:*** kl. 20. Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Æðuvík:*** kl. 16, Martin R. Jacobsen
***Hvannasunds kirkja:*** kl. 12, Elsa Funding
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Hans Eiler Hammer, útv.
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10, Niels Pauli Danielsen
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
***Sandur:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Jónsvein Bech. ***Talvan gongur fyri Stiftsnevndina hjá Bíbliufelagnum.***
***Vágur:*** kl. 11, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl. 12.30, Ólavur Ramussen
***Sumba:*** kl. 13 dópur og altarg., Patrick de Neergaard

**2. hvítusunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Jóannis Fonsdal
***Nólsoy:*** kl. 12, Bjarni Bæk
***Hvítanes:*** kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen
***Hests kirkja:*** kl. 12, Heri Joensen
***Sørvágur:*** kl. 11, David Johannesen
***Vestmanna:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Haldarsvík:*** kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
***Hvalvík:*** kl. 12, Inga Poulsen Dam
***Norðskála:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 Messa, Emil Olsen
***Eiði:*** kl. 20 Musikandakt, Jonni Dahl Hansen og Marita Joensen syngja.
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11,
***Selatrað:*** kl. 15, Jógvan Fríðriksson
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Rituvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð. Barnakór Glyvra kirkju syngur
***Leirvík:*** kl. 11, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer.
***Kl. 15*** Barnagudstænasta
***Mikladalur:*** kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 11, Elsa Funding. ***Á Viðareiði verður frá hvítusunnudegi farið í kirkju kl. 11.***
***Skopun:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Fámjin:*** kl. 11, altargongd. ***Talvan gongur fyri Stiftsnevndina hjá Bíbliufelagnum.***
***Øravík:*** kl. 12.15, altargongd. ***Talvan gongur fyri Stiftsnevndina hjá Bíbliufelagnum.***
***Sandvík:*** kl. 12, Ólavur Rasmussen

**Havnar kirkja**
Leygardagin 14. mai kl. 11.30 verður Matiné við sangbólkinum »Salt«.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Bíbliugransking, Barnabíbliutími, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 11 Útifundur – um viðrar.
Hvítusunnudag kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti. Major Njál Djurhuus og kunningarstjóri hjá Oslo løgregluni, Jørn Kristian Jørgensen talar um evnið »Við kærleikans vápnum«. Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Hámessa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur í Mariukirkjuni. Eingin suunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Ongi møtir á hvítusunnu vegna stevnu í Sørvági og ongin sunnudagsskúli á hvítusunnu.
Mikumorgun kl. 7 Bøn. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Meinigheitshúsið**
Hvítusunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Sverra Steinhólm.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti v/ Regin Olsen.

**KFUM og KFUK í Havn**
Leygardagin kl. 20 í KFUM: Ungdómsmøti við Jóanes Fonsdal, presti.
Mánadagin verður eingin eldrasamkoma, vegna 2. hvítusunnudag.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 Møti, har Súni S. Jacobsen talar. www.hebron.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Einki møti um hvítusunnuna vegna hvítusunnustevnuna í Skopun.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum verður frásøgn frá Sri Lanka, tað verður Stella Zachariassen ið greiðir frá. Kl. 11.30 Samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið »Eg eri hin góði Hirðin«. Barnaansing undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hvítusunnudag kl. 11 Gudstænasta, kl. 19 Møti v/ Jensinu Simonsen, Saltangará.
2. hvítusunnudag kl. 11.00 Gudstænasta.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Annan hvítusunnudag kl. 18 Møti við Martin Thomsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Eingi møti verða vegna Hvítusunnustevnu í Skopun. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Vakhús í Sandavági**
Evangel. møti leygarkvøldið kl. 20.
1. Hvítusunnudag kl. 20, Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri luttaka.

**Filadelfia, Miðvágur**
Onki møti um hvítusunnuna vegna hvítusunnustevnuna í Skopun.
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Møtir um hvítusunnuna við Leif og Hanne Braaten úr Noregi.
Fríggjakvøldið kl. 20 Manskórið syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 Streingjakórið syngur. Drekka aftaná.
Sunnudagin kl. 16 Familjumøti við barnakórinum og øðrum, kl. 19 Sangluttøka úr Hoyvík. Drekka aftaná.
Mánakvøldið kl. 19 Missiónsmøti, Ungdómskórið syngur.

**Skúlin í Gásadali**
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti við John Myllhamar, trúboðara. Innsavnan.

**Saron, Vestmanna**
Einki møti sunnudagin vegna hvítusunnustevnu í Skopun.

**Haldórsvík**
Sang- og vitnimøti verður hvítusunnukvøld kl. 18 í Avhaldshúsinum. Luttøka úr Meinigheitshúsinum í Havn.

**Missións-og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Bogi Olsen talar. Ungdómskórið syngur.
2. hvítusunnudag kl. 18 Møti, Jógvan Højgaard talar. Evnið: »Guds orð«. Náttúrði aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Hvítusunnudag verður møti kl. 18 har Jógvan Højgaard talar. Evnið er »Lívsstílur teirra fyrstu kristnu«. Ársgáva til Heimamissiónina verður savnað inn.
2. hvítusunnudag kl. 18 er sang- og vitnimøti.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

***Bøn***
*Takk góði Gud fyri at tú gevur tær far um hvørt einstakt menniskja. Takk fyri at tú gavst okkum son tín Jesus Kristus til frelsu. Takk fyri gávu Heilaga Andans. Styrk okkum í trúnni á frelsu tína. Halt tína signandi hond yvir fólki okkara bæði á sjógvi landi og verj okkum frá øllum illum. Verð hjá teimum, ið fingu tungar byrðar at bera, hjá teimum ið syrgja og sakna, hjá teimum, ið gráta yvir sítt miseydnaða lív. Hjálp okkum við Heilaga Andans vegleiðing, at liva tær til heiðurs og æru og okkara medmenniskjum at gagni, í Jesu navni amen!*

3. grein í Ápóstólsku trúarjáttanini er um trúnna á Heilaga Andan.

Eg trúgvi á Heilagan Anda, eina heilaga, almenna kirkju, samfelag teirra heilagu fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir.

Bíbliunnar boðskapur um hin trýeinda Gud er sera torførur at skilja, – eisini hjá okkum, sum trúgva á hann. Hvussu vit roynna at greiða frá, skilja sundur og seta saman, so koma fram nýggir viðkomandi spurningar, sum eru torførir ella ikki møguligir hjá okkum menniskjum at svara.

Heilagi Andin er ein, men hevur fleiri uppgávur og verður tískil eisini nevndur við ymsum nøvnum, alt eftir hvørjar av uppgávum hansara talan er um.

Eftir at Jesus hevur talað til lærusveinar sínar um burturferð sína, sigur hann við teir: »Og eg skal biðja Faðirin, og hann skal geva tykkum annan talsmann, fyri at hann skal verða hjá tykkum allar ævir, sannleikans anda, sum heimurin ikki kann taka ímóti, tí at hann sær hann ikki og kennir hann ikki.« (Jóh.14,16-17)

Her verður Heilagi Andin nevndur Talsmaður lærusveinana og Sannleikans Andi.

Tá ið Jesus ikki longur var millum lærusveinarnar likamliga, tá skuldi Talsmaðurin Heilagi Andin taka bústað í teimum og vera millum teirra. Hann skuldi føra sak teirra fyri Gudi og menniskjum, eins og Jesus gjørdi tað. Somu uppgávu ger Heilagi Andin í okkum, sum í dag trúgva gleðiboðskapinum.

Í orðingini eina heilaga almenna kirkju, verður sipað til øll menniskju á foldum, ið viðurkenna, at Jesus Kristus er Frelsari og Harri teirra. Vit kundu eisini sagt eina heilaga katólska ella heimsumfatandi kirkju, tí her er ikki talan um ein kirkjurætning ella eitt staðbundið kirkjulið, men um øll kristin menniskju á foldum. Felags fyri okkum kristnu er, at vit hava sama Gud, sama Frelsara og Heilaga Anda. Tí eru vit øll eitt stórt heimsumfatandi kirkjulið við Jesusi sum frelsara og harra okkara.

Samfelag teirra heilagu, er tað staðbundna kirkjuliðið, sum hvør einstakur kristin er ein partur av.

Eins og tað stendur um tey fyrstu kristnu (í Áp. 2), at »tey hildu fast saman um læru ápostlanna og samfelagið og breyðbrótingina og bønirnar«, soleiðis er eisini umráðandi fyri okkum kristnu í dag, regluliga at savnast saman við brøðrum og systrum í Harranum.

Felags fyri okkum kristnu er, at vit trúgva á fyrigeving syndanna:

At Jesus er frelsari okkara frá synd, deyða og djevli, at uttan frelsuverk hansara vóru vit uttan vón.

Við trúnni á Jesu Kristi frelsaraverk eiga vit lut í øllum tí, sum Gud Heilagur Andi vil vælsigna okkum við. Tað er: Frelsuvissu, frið og ósigandi gleði í hjarta, kærleika til brøður og systrar í Harranum, tænandi sinnalag o.s.fr.

Trúgvin á hin upprisna Jesus Krist gevur okkum eisini vón um uppreisn likamsins og ævigt lív.

Jesus segði: »Men tit skulu fáa kraft, tá ið Heilagur Andi kemur yvir tykkum, og tit skulu verða vitni míni, líka til ytstu endamørk á Jørðini«.

Gud gevi okkum Heilaga Andans kraft og vegleiðing, at vera vitni hansara.

**Sverri Steinhólm**

# GULLBRÚDLEYP

30. mai kunnu Margit og John Rasmussen á Strondum halda gullbrúdleyp. Veitsla verður í Bygdarhúsinum á Strondum leygardagin 28. mai. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið, vinarliga ringið á tlf. 448641 ella 221646 áðrenn 23. mai.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 21. mai kl. 13.00 giftast í heiminum Randi Simonsen og Karsten Jespersen, Norðdepli. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, eru vælkomin í hølið hjá Arbeiðsmannafelagnum í Norðdepli millum kl. 18.00 og 24.00.

Leygardagin 25. juni kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju, Katrin á Mýrini og Kári Næss Rasmussen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317022/243532 ella 222369 innan 11. juni.

Í samband við at Eyð í Funningsstovu og Gøran Melkersson *giftust* í Nuuk 17. februar, halda vit brúdleypsgildið 28. mai í Starvsmannafelagnum. Opið hús frá kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 28. mai kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Annika Djurhuus og Øssur Hammer. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, kunnu ringja 227876 ella 212076 áðrenn 18. mai.

Leygardagin 4. juni giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hildigerð Højgaard, Saltnes og Pól á Sondum Óskarson, Sandur. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 229302, 448056 ella 361652 áðrenn 25. mai.

Leygardagin 2. juli giftast í Christianskirkjuni Dania Ragnarsson og Terji Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurðin verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319125, 455950 ella 275180 áðrenn 15. juni.

Leygardagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Porkeris kirkju Jensia Nolsøe úr Trongisvági og Kristian Olsen úr Porkeri. Veitslan verður hildin íítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma,v erða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 12. juni á tlf. 313736, 264981 ella 272864.